Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Sjúkrarøktarfrøðingar í heilsuverkinum

Spurningar:

1. Hvørjar treytir eru um bústað hjá sjúkrarøktarfrøðingum, ið arbeiða í heilsuverkinum gjøgnum vikarstovur?
2. Hvør er lønin hjá sjúkrarøktarfrøðingi, ið kemur gjøgnum útlendska vikarstovu, og hvør er lønin hjá sjúkrarøktarfrøðingi, ið arbeiðir eftir sáttmálanum hjá Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, men sum ger sama arbeiði, og sum arbeiðir sama brøk?
3. Hvør rindar fyri kost og bústað hjá sjúkrarøktarfrøðingum, ið arbeiða í heilsuverkinum gjøgnum vikarstovur?
4. Kunnu sjúkrarøktarfrøðingar, ið búgva í Føroyum, arbeiða í heilsuverkinum gjøgnum útlendska vikarstovu?
5. Hvussu nógv rindar heilsuverkið árliga útlendskum vikarstovum fyri at fáa sjúkrarøktarfrøðingar?

Viðmerkingar:
Fyri at fáa greiðu á hesum viðurskiftum verður hesin fyrispurningur settur

Á Løgtingi, 20. juni 2022

Beinta Løwe Jacobsen